# nógv eru at velja í



metingar um, um tað út frá søguligu gongdini ber til at siga nakað um, hvussu tað hevði sást aftur í fólkatingsvalum í framtíðini, um flokkarnir gjørdu innanhýsis semju um at lækka talið á valevnum. Løgmaður nevndi fýra valevni í part, sum er sama talið, ið var tað vanliga í seksti árunum, og í prátinum eftir valsendingina týskvøldið helt onkur, at tað hevði verið passaligt at havt sjey valevni á hvørjum lista. Tað vil siga sama talið, sum var tað vanliga í sjeyti árunum.

## Onkrar staðfestingar

Hóast hon ikki hevur verið støðugt vaksandi, so er eyðsæð, at áhugin fyri at taka lut í fólkatingsvalinum hevur verið vaksandi. Tað kunnu vera fleiri orsøkir fyri hesum. Ein er, at føroyingar sum heild tykjast hava væl størri áhuga fyri at taka lut í valum, enn teir áður hava havt. Tað kann hava við tað at gera, at fjølmiðlarnir draga politikkin og politikkararnar nærri veljarunum, enn teir áður hava verið, og tað kann eisini hava við tað at gera, at føroyingar sum heild eru betri útbúnir og harvið kanska politiskt tilvitaðir nú, enn teir áður hava verið. Ikki minst er hetta galdandi fyri konufólkini.

Í 2001 var valluttøkan hægri, enn hon nakrantíð áður hevur verið á fólaktingsvalinum. Tá hevði fullveldisætlanin verið frammi í trý ár, uttan at veljarin hevði havt møguleika at geva sína áskoðan til kennar á løgtingsvalum ella fólkatingsvalum. Tað varð mett sum ein av orsøkunum til, at áhugin var so stórur.

Hóast valluttøkan hesa ferð var eitt sindur lægri, so var hon stór, tá ið sammett verður við nógv av undanfarnu fólkatingsvalunum. Hesa ferð ber ikki til at siga, at føroyski veljarin hevur verið svangur eftir at velja, um tað ber til at siga tað soleiðis. Kommunuval var í november, og tað vóru løgtingsval bæði í 2002 og í 2004. At tað í Gallup kanning varð roknað við, at kappingin var tøtt um teir báðar sessirnar, kann hava havt við sær, at lut-tøkan var størri, enn hon ofta hevur verið áður.

Umframt politiskar orsøkir so kunnu í hvussu so er tvær aðrar orsøkir verða til, at valluttøkan er so nógv hækkað. Ein er, at valevnini eru vorðin fleiri, og ein onnur er, at talið á kvinnum, sum bjóða seg fram á fólkatingsvalunum, er økt nógv í níti árunum.

Kvinnuligi parturin av valevnunum fer nevyan at minka. Heldur fer gongdin at verða tann, at eins nógvar kvinnur sum menn fara at bjóða seg fram.

Spurningurin er, um valluttøkan fer at minka, um flokkarnir finna fram til semju um, at talið av valevnum skal verða lægri, enn tað hevur verið tær seinastu ferðirnar. Tað er ivaleyst soleiðis, at tað í valstríðnum og serliga millum tey ókendu og óroyndu valevnini eru einstøku valevnini, sum royna at fáa síni næstu at fara á val. Í flestu førum er ikki talan um skipað floksapparat, men heldur er tað soleiðis, at tað eru valevnini, sum reka hvørt fyri seg. Eingin vil vera lakastur í atkvøðubýtinum, og tá ið tættleikin er so mikið stórur, sum hann ofta hevur verið millum stóru flokkarnar, so kunnu tað vera atkvøðurnar, sum tey, ið fáa minst, skava saman, ið gera av, hvør verður valdur.